# KRABBAMEINSFELAGIÐ

ÁRSFRÁGREIÐING 2018

## Krabbameinsfelagið

Grønlandsvegur 58
Postboks 1216
110 Tórshavn
Telefon: 31 79 59
Heimasíða: www.krabbamein.fo
T-postur: kmf@krabbamein.fo


Starvsfólk
Dagligur leiðari:
Jansy Gaardlykke
Ráðgevandi sjúkrarøktarfrøðingur:
Sólrun Jacobsen
Skrivstova:
Poula Norðbúð

## Nevndin í Krabbameinsfelagnum

Formaður: Durita Tausen
Næstformaður
& kassameistari: Sonja Nielsen
Nevndarlimur: Magnus Magnussen
Nevndarlimur: Katrin Kallsberg
Nevndarlimur: Johan Poulsen

Tiltakslimur: Martin Joensen
Tiltakslimur: Elmar Ósá

## Hjálpargrunnurin

Durita Tausen
Katrin Kallsberg
Jónvør Christiansen

## Team Rynkeby Føroyar

Elmar Ósá
Katrin Kallsberg
Durita Tausen

# Innihald


Fororð ........ 1

Átøk, samstørv og annað virksemi ........ 2

- Metstórur stuðul frá Team Rynkeby Føroyar ........ 2
- Grannakaffi er meira enn krónur og oyru ........ 2
- Gongu½maraton ........ 2
- Føroya vakrasta hálv maraton saman við ÍF Frælsi og Krabbameinsfelagnum ........ 3
- Almennur fyrilestur um seinfylgjur eftir krabbameinssjúku og krabbameinsviðgerð ........ 3
- Movember ........ 3
- Sjúkrarøktarfrøðilesandi í starvsvenjing ........ 4
- Spyr.fo og Krabbameinsfelagið halda fram við samstarvinum á triðja ári ........ 4
- Stuðulsavtalan millum 62°N vinna og Krabbameinsfelagið eitt ár á baki ........ 4
- Evropeiskt og norðurlendskt samstarv ........ 4
- Norðurlendsk Bróstkrabbaráðstevna ........ 5
- Gongutúr við Krabbameinsfelagnum á summarmáladegi ........ 5
- Seglbátur úr Týsklandi á Havnini ........ 5

Fíggjarligur stuðul/stuðul til gransking ........ 6

Ráðgeving og hjálparbólkar ........ 7

Virksemi í ymsu bólkunum ........ 8

  - Foreldrabólkurin: ........ 8
  - Prostatabólkurin: ........ 8
  - Stomibólkurin: ........ 8
  - Lip- og lymfødembólkurin: ........ 8
  - Móðurmerkjabólkurin: ........ 8
  - Bót til Bata: ........ 8
  - Undirlívsbólkurin: ........ 9
  - Seinfylgjubólkurin: ........ 9

Tilboð til sjúklingar og avvarðandi ........ 10

Krabbameinshagtøl ........ 12

# Fororð

Krabbameinsfelagið hevur verið virkið nú í 40 ár. Tað var Lionsfelagið í Havn, sum eftir áheitan frá hjúnunum Bjarna og Sannu Dahl Niclasen tók stig til at stovna felagið. Vit gleðast um, at felagið varð stovnað og alt tað arbeiðið, sum felagið hevur kunnað gjørt hesi árini.

Aftur í 2018 untist okkum at gera mun. At hjálpa. At veita stuðul. At geva ráð. At lætta um, tá ið lívið var hart.

Tað ber til, tí vit hava fingið stuðul. Og bara tí. Nógvan og góðan stuðul. At nógv sjálvboðin hava hjálpt. Við tíð og við peningi. Hava verið góð í ráðum. At fyritøkur hava stuðlað fíggjarliga. At myndugleikar hava víst vælvild. At góð og dugnalig starvsfólk eru runt um í landinum.

Vit takka hjartaliga fyri allan stuðul og alla vælvild.

Størsta einstaka tiltakið í 2018 var norðurlendska bróstkrabbaráðstevnan. Ráðstevnan gekk so serstakliga væl, skráin var ógvuliga fjølbroytt og tey 170 fólkini, sum vóru á ráðstevnuni, fingu nógv burtur úr og vóru væl nøgd. Tøkkina eiga tær dugnaligu kvinnurnar í Bót til bata, sum skipaðu fyri, og starvsfólkini hjá Krabbameinsfelagnum.

Tað verður tíbetur støðugt granskað í krabbameini, í Føroyum og runt um í heiminum. Vónin er, at gátan verður loyst. Enn er málið ikki rokkið, og tað sæst eisini í krabbameinshagtølunum. Nýggjastu tølini eru fyrilbilstøl, og tey skulu verða tikin við fyrivarni. Færri hava fingið staðfest móðurmerkjakrabba, men nógv eru, sum hava fingið staðfest húðkrabba. Tað er lívgandi, tá ið dagarnir verða longri og sólin vermir meira. Vit skulu bara eisini minnast til at vera varin og njóta hana við skili.

Fleiri hava fingið staðfest bróstkrabba. Tað var roknandi við, nú allar kvinnur millum 50 og 69 ár fáa bjóðað at verða kannaðar. At fáa staðfest krabban fyrr, gevur betri útlit fyri at fáa heilsubót og at sjúkan ikki sleppur at gera so nógv um seg.

Vit eru við treysti farin undir 2019. Eisini við vón um, at batar kunnu verða gjørdir á fleiri økjum.

Landsstýriskvinnan í heilsumálum hevur sett arbeiðsbólk at eftirmeta verandi skipan á palliativa økinum og koma við tilmæli um, hvussu økið betur eigur at verða skipað.

Eisini er Heilsumálaráðið farið undir at kanna og staðfesta, hvussu nógv av tilmælunum í Krabbameinsætlanini eru rokkin. Tað verður gott grundarlag undir at gera nýggja krabbameinsætlan.

Hóast lívið kann vera tungt, kunnu vera góðar løtur. Løtur saman við øðrum. Løtur við umsorgan. Løtur, har vit eru saman í sorgini. Løtur, tá ið vit samgleðast, tí tað gongur betur. Og tí tað gongur væl.

Vit kunnu øll, hvør í sínum lagi, gera okkara til at lætta um hjá hvør øðrum. Vit í Krabbameinsfelagnum skulu gera okkara part.



**Durita Tausen**,
*formaður í Krabbameinsfelagnum*

## Átøk, samstørv og annað virksemi

**Metstórur stuðul frá Team Rynkeby Føroyar**

Peningurin, sum Team Rynkeby Føroyar savnaði inn í sambandi við túrin til París í 2018, varð handaður Duritu Tausen, formanni í Krabbameinsfelagnum, leygardagin 15. september á samkomu í Auluni í Finsen. Innkomna peningaupphæddin í 2018 var 1.330.000 kr.

Team Rynkeby er norðurlendskt vælgerðar súkklulið, sum á hvørjum ári súkklar til París fyri at savna pening inn til børn við lívshættisligum sjúkum og familjur teirra.

Tá ið Team Rynkeby á sinni byrjaði, varð stuðul einans latin børnum við krabbameini og familjum teirra. Hetta er broytt, soleiðis at Team Rynkeby nú letur stuðul til børn við hættisligum sjúkum og familjur teirra, og sostatt eisini til børn við til dømis lungna- og hjartasjúkum.

Krabbameinsfelagið umsitur peningin, og familjur at børnum við lívshættisligum sjúkum og onnur kunnu venda sær til Krabbameinsfelagið at fáa meiri kunning um stuðulsmøguleikar.

**Grannakaffi er meira enn krónur og oyru**

Grannakaffi var fyriskipað á triðja sinni, og var 2. - 4. mars 2018.

Vertirnir eru fegnir um høvið at práta um tað, sum vit vanliga ikki práta um í gerandisdegnum. Og tosa opið um tey kæru, ið ikki eru millum okkum longur. Meginparturin av vertunum eru fólk, ið hava kent sviðan av krabbameini, og fyri tey er Grannakaffi eitt gott høvi at gera mun og hjálpa Krabbameinsfelagnum at hjálpa øðrum.

Í 2018 vóru 59 vertir, sum er væl færri enn árini frammanundan, og upphæddin var eisini lægri, enn árini frammanundan.

Inn komu góðar 250.000 kr. í stuðli. Talan um eina stórfingna upphædd, sum Krabbameinsfelagið er ómetaliga takksamt fyri, og sum ger stóran mun í arbeiðinum hjá felagnum.

**Gongu½maraton**

Í dýrdarveðri sunnudagin 3. juni í 2018 gingu 150 fólk hálvmaraton hjá Krabbameinsfelagnum, sum er ein partur av Tórshavn Maraton.

Karmarnir vóru framúr góðir frá byrjan til enda og Durita Tausen, formaður í Krabbameinsfelagnum bar fram røðu fyri rennarum og gongufólki.

Mikudagin tann 1. august, knapt tveir mánaðir aftaná Tórshavn Marathon 2018, vóru umboð fyri Bragdið á vitjan í hølunum hjá Krabbameinsfelagnum. Ørindini vóru at handa Krabbameinsfelagnum ein gávukekk.

Í tilmeldingargjaldinum til gongu1/2maraton fóru 100 kr til Krabbameinsfelagið. Tó bar væl til at lata meira, um ein vildi tað og somuleiðis kundu øll onnur, sum runnu hálvt og heilt maraton, stuðla við einari upphædd.

Vit vóru bæði rørd og glað um, at áhugin at lata peningaligan stuðul var so stórur, og í 2018 var upphæddin tilsamans 24.600 kr.

**Føroya vakrasta hálv maraton saman við ÍF Frælsi og Krabbameinsfelagnum**

Ítróttarfelagið Frælsi í Vágum skipar árliga fyri eini hálv maraton renning í september. Runnið verður úr Gásadali og til kirkjuna í Sandavági.

Umframt vanliga hálv maraton renning, verður eisini skipað fyri gongu½maraton. Hetta varð gjørt í samstarvi við Krabbameinsfelagið. Í 2018 var luttakaratalið metstórt. Út við 1.000 fólk vóru tilmeldað og av teimum vóru tað 460 fólk, ið gingu hálv maraton. Inn komu kr. 46.000 í stuðli, sum vit eru sera takksom fyri.

**Almennur fyrilestur um seinfylgjur eftir krabbameinssjúku og krabbameinsviðgerð**

Mánakvøldið 24. september var fyrilestur um seinfylgjur eftir krabbameinssjúku og viðgerð. Hann var í Smæruni í Havn.

Fyrilestrarhaldari var Marianne Nord Hansen, forkvinna í seinfylgjufelagnum í Danmark. Marianne Nord Hansen hevur sjálv havt krabbamein og hevur í nógv ár ráðgivið og vegleitt fólki, sum hava seinfylgjur.

Viðgerð fyri krabbamein er tíbetur batnað nógv seinastu árini og alsamt fleiri verða frísk. Tað eru tíverri nógv, sum fáa seinfylgjur av sjúkuni og viðgerðini. Seinfylgjurnar kunnu vera til stóran ampa, og tær kunnu eisini vísa seg, tá ið long tíð er fráliðin.

Marianne Nord Hansen greiddi frá vanligastu seinfylgjunum og hvør viðgerð er fyri tær. Eisini hvat kann verða gjørt fyri at lætta um og hvørjum hildið skal verða eyga við, tá ið tað talan er um seinfylgjur.

Áleið 100 fólk møttu til fyrilesturin.

**Movember**

Movember, ein samanseting av orðunum mustage og november, er eitt árligt tiltak, har menn kring um í heiminum lata yvirskeggið vaksa fyri at varpa ljós á heilsuna hjá monnum. Tað vísir seg, at menn ikki altíð taka sína heilsustøðu í álvara, fyrr enn ov seint er. Um krabbameinssjúka, eins og aðrar við, verður staðfest nóg tíðliga, eru góðar vónir fyri at tær verða lektar. Men trupulleikin millum menn er júst tann, at teir ofta aftra seg við at fara til lækna.

Í 2018 gjørdi Reyni Service av at gera eitt serligt Movember stuðulsátak til frama fyri Krabbameinsfelagið.

- *Vit virka í einum umhvørvi, har tað er stórur meiriluti av monnum, bæði tá ið tað kemur til tey mest biláhugaðu og egin starvsfólk. Og tá okkara virksemi umfatar bilar, mettu vit tað nærliggjandi at geva fleiri bilum yvirskegg. Tað kann tí meiri enn so henda seg, at fólk møta einum av okkara bilum við yvirskeggi í november. Hóast yvirskeggið á bilunum er hugsað sum eitt skemtiligt innslag, so er boðskapurin sera álvarsamur. Endamálið við hesum átakinum er bæði at sjónlig gera Movember, men eisini at geva fólki, sum ynskja at keypa ein nýggjan bil, møguleika at stuðla Krabbameinsfelagnum fíggjarliga,* segði Sámal av Reyni.

MBM setti eisini sjóneykuna á Movember við eini myndarøð á Facebook undir heitinum "Hvar er títt mjólkaskegg?"

**Sjúkrarøktarfrøðilesandi í starvsvenjing**

Í oktober vóru fýra sjúkrarøktarfrøðilesandi frá sjúkrarøktarfrøðideildini á Fróðskaparsetur Føroya í starvsvenjing í Krabbameinsfelagnum

Lesandi skuldu hesaferð hava fokus á heilsufremjandi og fyribyrgjandi sjúkrarøkt í samfelagsligum høpi, og skuldu skriva eina uppgávu útfrá teirra eygleiðingum á staðnum.

Tær lesandi vóru: Sandra Gleðisheygg, Óluvá Viðoy, Agnas Olsen og Heidi Fjallstein.

**Spyr.fo og Krabbameinsfelagið halda fram við samstarvinum á triðja ári**

Spyr.fo er spurnatænasta, sum ger skjótar spurnakanningar millum føroyingar á fartelefonini. Fyri hvønn luttakara letur tann, sum ger kanningina, 4 krónur til Krabbameinsfelagið. Hetta ljóðar kanska ikki av nógvum, men tá ið 400 fólk svara hvørji kanning, verður hetta skjótt til ein munandi stuðul til Krabbameinsfelagið.

Higartil hava gott 5000 føroyingar teknað seg til spyr.fo, og hava til samans 50 túsund ferðir svarað spurnakanningum og soleiðis útvegað Krabbameinsfelagnum umleið 200 túsund krónur í stuðli.

Í 2018 gjørdu Krabbameinsfelagið og Spyr.fo eina spurnarkanning um føroyingar og stuðul til vælgerandi endamál. Kanningin vísti millum annað, at 78% av føroyingum stuðla hjálparfelagsskapum, 56% stuðla sjúklingafeløgum, at kvinnur stuðla oftari enn menn, meðan menn lata størri upphæddir enn kvinnur.

**Stuðulsavtalan millum 62°N vinna og Krabbameinsfelagið eitt ár á baki**

Fyri einum ári síðan gjørdi 62°N vinna eina stuðulsavtalu við Krabbameinsfelagið. Avtalan inniber, at 62°N vinna letur ein fíggjarligan stuðul til Krabbameinsfelagið fyri hvønn ferðandi.

Hvørja ferð ein fyritøka ella stovnur keypir ein ferðaseðil frá 62°N vinnu, verða 15 kr. latnar til Krabbameinsfelagið. Jú fleiri ferðandi eru, tess størri verður stuðulin. Ferðaseðilin kostar ikki nakað eyka fyri tann sum bíleggur, men er hetta ein stuðul, sum 62°N vinna letur.

2018 hevur hilnast væl, og kemur stuðulin sera væl við fyri felagið.

**Evropeiskt og norðurlendskt samstarv**

Í november var Krabbameinsfelagið á fundi í ECL (European Cancer Leagues). Fundurin varð hildin í Berlin. ECL varð sett á stovn í 1980 og føroyska Krabbameinsfelagið hevur havt fullan limaskap síðan 2000. Tilsamans eru 24 lond limir í felagskapinum. Aðalendamálið hjá felagsskapinum er at fylgja við og ávirka heilsupolitikkin í Evropa.

Krabbameinsfelagið er eisini limur í NCU (Nordic Cancer Union). NCU er eitt samstarv millum tey norðurlendsku krabbameinsfeløgini. Endamálið hjá NCU er at tryggja bestu viðgerð fyri krabbamein og at seta í verk munagóð fyribyrgingarátøk í Norðurlondum. Í 2018 vóru tríggir fundir í NCU, í februar, mai og oktober. Allir fundirnir vóru í Keypmannahavn. Limalondini skiftast um at hava formansskapin, og árini 2018-2020 hevur Danmark formansskapin.

**Norðurlendsk Bróstkrabbaráðstevna**

Vikuskiftið 21. og 22. september í 2018 var norðurlendsk ráðstevna á Hotel Føroyum, fyri kvinnur, sum hava havt bróstkrabba. Tað var bólkurin Bót til Bata hjá Krabbameinsfelagnum, sum skipaði fyri.

Ráðstevnan var fyri kvinnur, sum hava havt bróstkrabba og arbeiða sum sjálvbodnar hjá Krabbameinsfeløgum í Norðurlondum. Talan er um ráðstevnu, ið verður hildin annað hvørt ár.

Endamálið við ráðstevnuni er at geva sjálvbodnum eitt høvi at koma saman, fáa undirvísing og íblástur frá hvør øðrum. Umleið 140 kvinnur úr Føroyum, Íslandi, Noregi, Svøríki, Finnlandi og Danmark luttóku á ráðstevnuni. Aftrat hesum luttóku 30 fólk úr føroyska heilsuverkinum.

**Gongutúr við Krabbameinsfelagnum á summarmáladegi**

Summarmáladag byrjar summarhálvárið, mýrisnípan kemur og lundin kemur undir land. Tá er eitt gott høvi at fara út í náttúruna aftur eftir ein kaldan og myrkan vetur.

Nógvar kanningar eru gjørdar, sum vísa á, at røra vit okkum javnan, kann hetta minka um vandan fyri krabbameini. Verjandi ávirkanin, sum rørsla hevur á krabbamein, veksur munandi, jú virknari vit eru.

Rørsla er eisini umráðandi í sambandi við krabbameinssjúku, bæði likamliga og sálarliga. Rørsla bøtir um útlitini fyri at fáa heilsuna aftur, samstundis sum hon gevur styrki at standa ímóti hørðu viðgerðini.

Summarmáladag, leygardagin 14. apríl, skipaði Krabbameinsfelagið fyri gongutúrum. Fólk fóru til gongu ymsastaðni um landið. Talan var um lættar túrar, so at øll kundu vera við.

Gongutúrar vóru í Klaksvík, Gøtu, Saltangará, Vestmanna, Kvívík, Tórshavn, Sandavági, Vági, á Tvøroyri, Sandi, Hvítanesi og Strondum.

**Seglbátur úr Týsklandi á Havnini**

Um mánaðarskiftið juli august var seglbáturin Magic í Føroyum. Hann  var á veg til Svalbard á eina Artic Challange. Tað er vælgerðarstovnurin Segelrebellen í Tysklandi, sum rekur bátin.

Stigtakari og skipari er Marc Naumann. Marc hevur havt heilakrabba tvær ferðir, og at sigla hjálpti Marc ígjøgnum kemoterapi. Tað hjálpti honum at hava dreymin um at hjálpa øðrum, at berjast fyri dreyminum og ikki at gevast.

Slagorðið hjá Segelrebellen er F*ck cancer – go sailing. Tey sigla í Atlantshavinum, Norðsjónum og Baltiskasjónum. Tey gera 10 daga túrar á opnum havi, alt árið runt. Ung vaksin, sum hava ella hava havt krabbamein, kunnu koma umborð og royna seg sum sjófólk. Tey eru við á jøvnum føti við restina av manningini. Tey ungu læra, at hóast tað til tíðir er hart og strævið og at alt gongur ímóti, so nyttar einki at steðga upp. Veðrið má sær ráða, men vit kunnu stýra bátinum og soleiðis klára okkum sum best í tí ringa veðrinum.

Tey bjóðaðu ungum føroyingum, sum hava ella hava havt krabba, við umboð ein túr kring oyggjarnar, og Ragnhild Joensen, sum hevði krabbamein sum barn, varð umboð í tvey samdøgur.

## Fíggjarligur stuðul/stuðul til gransking

**Team Rynkeby Føroyar Grunnurin hjá Krabbameinsfelagnum – Fíggjarligur stuðul til álvarsliga sjúk børn**

Í Føroyum savnar Team Rynkeby inn til Krabbameinsfelagið, og haðani kunnu børn við lívshættisligum hjarta- og lungnasjúkum og børn við krabbameini søkja stuðul.

**Hjálpigrunnurin hjá Krabbameinsfelagnum**

Krabbameinssjúklingar kunnu fáa fíggjarligan stuðul úr Hjálpargrunninum hjá felagnum. Stuðul kann verða veittur til sjúkligar, sum innanfyri seinastu tvey árini hava verið í viðgerð fyri krabbamein. Umsøkjarin skal búgva í Føroyum.

Hjálpargrunnurin verður stjórnaður av einari 3-manna nevnd. Formaðurin í Krabbameinsfelagnum er fastur limur og ein av nevndarlimunum skal verða lækni.

**Krabbameinsfelagið stuðlar granskingarverkætlan**

Við stuðli frá Krabbameinsfelagnum og Team Rynkeby Grunninum hjá Krabbameinsfelagnum er ein verkætlan farin av bakkastokki, hvørs endamál er at lýsa krabbameinsøkið í Føroyum. Team Rynkeby Grunnurin hevur givið 600 túsund krónur í stuðli og Krabbameinsfelagið hevur givið 100 túsund krónur.

Verkætlanin skal lýsa krabbamein í Føroyum bæði meiri yvirskipað, og í smálutum at kanna samband millum krabbamein og eitt nú aldur, bústað og líknandi viðurskifti, sosialar umstøður, broytingar gjøgnum tíðina og hvussu krabbamein tyrpist innan familjur.

Fleiri av kanningunum snúgva seg um barnakrabba, har millum annað verður farið inn á at lýsa barnakrabba í Føroyum út frá títtleika, sløgum, aldri, bústaði og líknandi viðurskiftum, hvussu hesar sjúkur tyrpast í familjum, viðgerð, prognosu og fylgisjúkum, umframt at kanna samband millum burðartyngd og krabbamein o.a.

Verkætlanin gagnnýtur, sum grundkeldu til hesar kanningar, ta serstøku krabbameinsskránna, har skrásettir eru tilburðir av krabbameini í Føroyum heilt aftur til 1960.

Hóast nakað er granskað í krabbameini í Føroyum, og einstakar verkætlanir eru í gongd, hevur granskingin verið rættiliga sundurbýtt. Henda verkætlanin er fyrsta stigið til eina savnandi granskingarstrategi, sum kann veita munadygga vitan um krabbamein í Føroyum.

Umframt ta sjálvsøgdu vitan um krabbamein, ið tørvur er á við atlit til at leggja ætlanir og fyribyrgja, so verður roknað við, at ein savnandi granskingarstrategi innan krabbameinsøkið fer at føra við sær heilsufyrimunir fyri fólk, tá ið tað snýr seg um viðgerð og heilsufremjan.

Sjúkrakassagrunnurin stuðlar eisini verkætlanina. Marin Strøm og Maria Skaalum Petersen, lektarar á Fróðskaparsetrinum, verða PhD vegleiðarar og Bjarni á Steig, yvirlækni, verður hjávegleiðari. Ílegusavnið og Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu eru eisini við í verkætlanini.

## Ráðgeving og hjálparbólkar

Í Krabbameinsfelagnum hevur, sum undanfarin ár, verið nógv samskifti og samband við fólk við krabbameini, avvarðandi og onnur.

Tveir ráðgevandi sjúkrarøktarfrøðingar starvast hjá Krabbameinsfelagnum. Tær vegleiða, hava telefonviðtalu og beinleiðis samtalur við sjúklingar, familjur og avvarðandi. Sjúklingum stendur eisini í boði at gerast partur av samtalubólkum og sjálvhjálparbólkum.

Umframt hetta fara tær á vitjan á virkjum, stovnum, skúlum o.a. og kunna um Krabbameinsfelagið og veita hjálp og ráðgeving.

Krabbameinsfelagið er talurørið hjá krabbameinssjúklingum og teirra avvarðandi. Tað er tí fremsta uppgávan hjá starvsfólkunum at varnast tørv og áhugamál hjá krabbameinsraktum, at menna tænastur og at skipa samskiftisátøk hareftir.

## Virksemi í ymsu bólkunum

Nógv virksemi er í ymsu bólkunum og skipað hevur verið fyri bæði fyrilestrum, hugnaløtum og øðrum átøkum.

**Foreldrabólkurin:** Nevndin skipaði seg soleiðis: Ella Leivsgarð, forkvinna, Magni Jarnskor, næstformaður og Finngerð Joensen, skrivari.

Eftir ætlan skuldi ein túrur verða út í Kallsoynna á vári í 2018. Túrurin var fyriskipaður og alt var klárt, men túrurin bleiv útsettur vegna illveður. Í september vóru familjurnar ein túr við Norðlýsinum. Hetta var ein sera gevandi og minnisrík løta, og eftir túrin fóru familjurnar á Pizza 67 at eta. Fleiri í bólkinum vóru til Gallaveitsluna hjá Team Rynkeby Føroyar, og eisini til samkomuna í Perluni í Havn, tá ið súkklarar og hjálparfólk settu kósina móti París. Ragnhild Joensen, sum sjálv hevur havt krabbamein sum smágenta, bar fram røðu í Perluni.

**Prostatabólkurin:** Prostatabólkurin hevði tvær hugnaløtur í 2018 og undirtøkan var góð. Tann fyrra var í februar, og tann seinna í oktober, har Magni Mohr, ph.d. í ítróttarfysiologi, segði frá um kropsliga venjing sum viðgerð fyri prostatakrabba.

Í apríl var formaðurin á landsfundi hjá PROPA í Fredericia. Á landsfundinum vóru fleiri góðir fyrilestrar og gott kjak. M.a. varð komið inn á alternativar viðgerðir, hvørjum ansast skal eftir og hvat er gott. Screening, læknalig vitan og royndir elvdu til lívligt kjak, og Mads Hvid Aaberg Poulsen, MD, ph.d., Odense Universitets-sjúkrahús, tosaði um hvussu langt eru vit komin og hvat kunnu vit vænta. Ein góður og gevandi landsfundur.

**Stomibólkurin:** Seinastu árini hevur ikki verið nakað virksemi í bólkinum. Stomiambulatoriið skipaði fyri hugnakvøldi fyri fólki, sum hava stomi og teirra avvarðandi, tann 11. apríl í 2018 á Hotel Føroyum. Evnið var "brok og buglur", sum læknin Eyðfinn Olsen hevði eitt upplegg um. Umboð frá Dansac & Hollister søgdu frá og vístu fram tað nýggjasta innan stomiútgerð og bjóðaðu eitt ábit. Nógv fólk møttu.

**Lip- og lymfødembólkurin:** Bólkurin hittist tvær ferðir í 2018. Til fyrru hugnaløtuna var Eliesar Olsen og greiddi frá um feittsúgving sum møguliga viðgerð. Til ta seinnu hugnaløtuna var Poula Patursson, dietistur, og greiddi frá týdninginum av kosti og vekt tá ið talan er um lip- og lymfødem. Nevndin luttók á norðurlendskum fundi, umframt at tær hátíðarhildu lip- og lymfødemdagin við at gera armbond og troyggjur við ymsum slagorðum á.

**Móðurmerkjabólkurin:** Tað eydnaðist ikki Móðurmerkjabólkinum at hava fund í 2018. Hetta kann vera tekin um, at tað ikki er líka stórur tørvur á bólkinum, tí færri fáa móðurmerkjakrabba og tað er gleðiligt.

**Bót til Bata:** Bólkurin hevði úr at gera við at fyrireika stórfingnu bróstkrabbaráðstevnuna í oktober. Ongar hugnaløtur ella regluligir fundir vóru tískil í 2018. Bólkurin seldi sum vant príðislutir í samband við at oktober er bróstkrabbamánaður. Í ár vóru tað Elsa Bech og Verkstaðið Vón, sum høvdu sniðgivið smykkurnar.

**Undirlívsbólkurin:** Bólkurin skipaði fyri einari hugnaløtu í 2018. Hetta kvøldið var Ann Danielsen, serlækni í gynækologi/obstetrik á Landssjúkrahúsinum, og segði frá um eyðkenni fyri undirlívskrabba, hvussu viðgerð verður skipað, um seinfylgjur og viðgerð fyri seinfylgjur eftir sjúku, og viðgerð av undirlívskrabba.

**Seinfylgjubólkurin:** Viðgerð fyri krabbamein er tíbetur batnað nógv seinastu árini og alsamt fleiri verða frísk. Tað eru tíverri nógv, sum fáa seinfylgjur av sjúkuni og viðgerðini. Seinfylgjurnar kunnu vera til stóran ampa, og tær kunnu eisini vísa seg, tá ið long tíð er fráliðin. Í 2017 skipaði Krabbameinsfelaigð fyri almennum fyrilestrum um seinfylgjur eftir sjúku og viðgerð av krabbameini. Eftir fyrilesturin fingu fólk høvi at skriva seg upp til at koma í ein nýggjan hjálparbólk hjá Krabbameinsfelangum, Seinfylgjubólkin.

Seinfylgjubólkurin hittist fyrstu ferð í januar í 2018 og aftur í mai. Í oktober var fyrilestur við Marianne Nord Hansen, forkvinnu í seinfylgjufelagnum í Danmark. Marianne greiddi frá vanligastu seinfylgjunum og hvør viðgerð er fyri tær. Eisini hvat kann verða gjørt fyri at lætta um og hvørjum hildið skal verða eyga við, tá ið tað talan er um seinfylgjur. Eini 100 fólk vóru til fyrilesturin.

## Tilboð til sjúklingar og avvarðandi

**Samtalubólkur fyri tey, sum hava mist makan:** Endamálið við at savna fólk, ið hava mist makan, er at geva tí einstaka møguleikan at seta orð á og viðgera tær kenslur, teir tankar og trupulleikar, sum eru, tá ið tú missir makan. Samtalurnar við onnur í somu støðu kunnu stuðla og styrkja víðari í lívinum.

**Samtalubólkur fyri fólk, sum eru sjúk av krabbameini:** At vera sjúk/-ur og fáa viðgerð fyri krabbamein kann vera sera tyngjandi og ávirka alla tilveruna, viðgerðin hevur ofta hjáárin við sær og sálarliga kann tað eisini vera torført. At hitta onnur í líknandi støðu kann gera stóran mun. Royndirnar hjá okkum í Krabbameinsfelagnum vísa, at tað hjálpir at práta við onnur og seta orð á og deila ymiskar upplivingar. Hetta minkar um óttan, og tú fært lættari greiðu á tí, sum bilgist innaní av kenslum og tonkum.

**Skeið í hár-, húð- og andlitsrøkt fyri kvinnur við krabbameini:** Body Shop í SMS skipar regluliga fyri skeiðum í hár-, húð- og andlitsrøkt. Umframt starvsfólk er eisini hárskeri við royndum í at gera hárkollar til staðar. Skeiðið er fyri kvinnur, sum nýliga eru farnar í viðgerð fyri krabbamein. Skeiðið er ókeypis og Krabbameinsfelagið tekur sær av at lýsa og kunna um skeiðini.

**Familjusamtalur:** Familjusjónarhornið hevur stóran týdning í ráðgevandi arbeiðinum hjá felagnum. Tá ið ein í familjuni gerst sjúk/ur ella doyr, rakar tað alla familjuna, eisini børnini. Endamálið við familjusamtalum er, at øll í familjuni í felag fáa sett orð á tað, sum er svárt og torført og á tann hátt fáa hjálp til í felag at stuðla og hjálpa hvør øðrum.

**Listterapi:** Í 2018 var aftur skipað fyri listterapi-skeiðum fyri fólki, sum hava ella hava havt krabbamein. Listterapiskeið eru tvær ferðir árliga, á vári og á heysti.

**Opið Hús:** Opið hús er eitt tilboð, ætlað fólki, sum hava ella hava havt krabbameini. Høvi er at støkka inn á gólvið, og fáa ein drekkamunn, eitt prát við onnur í somu støðu ella við starvsfólk í felagnum, um tørvur er á tí. At hitta onnur í líknandi støðu kann gera stóran mun. Okkara royndir vísa, at tað hjálpir at tosa við onnur og seta orð á og deila ymiskar upplivingar. Hetta minkar um óttan, og tú fært lættari greiðu á kenslum og tonkum. Lívsmótið og lívsgóðskan gerast størri, og dagligu avbjóðingarnar verða lættari.

**Tá ið starvsfelagið gerst sjúkur:** Ráðgevarar hjá Krabbameinsfelagnum vóru á virkisvitjan og kunnaðu um Krabbameinsfelagið og undirvístu leiðslu og stavsfólki í hvussu farast kann fram, tá ið ein starvsfelagið gerst sjúkur.

**Sosialráðgevi:** Tá ið krabbameinsjúka rakar, verða tann sjúki og tey avvarðandi ofta eisini rakt sosialt, og nógvir sosialir spurningar koma upp at venda. Krabbameinsfelagið bjóðar tí ókeypis ráð og vegleiðing frá einum sosialráðgeva.

Fólk vendu sær í høvuðsheitum til sosialráðgevan, tí at inntøkugrundarlagið var hótt – antin tí tey vóru uppsøgd úr teirra starvi, og uppsagnartíðin var við at renna út, ella tí veiting eftir sjúkradagpengalógini var um at vera uppi. Í nøkrum førum var vegleitt í at søkja fyritíðarpensjón, tí støðan tíanverri var soleiðis, at viðkomandi ikki megnaði at fara til arbeiðis aftur. Tey, ið møguliga ikki megnaðu at arbeiða fulla tíð vegna seinfylgjur av krabbameinssjúkuni, vórðu kunnað um møguleikan at koma í tillagað starv. Har útlitini vóru góð fyri, at tey aftur komu í vinnu, men megnaðu hetta ikki áðrenn uppsøgnin fekk virknað ella áðrenn 40 viku reglan í sjúkradagpenga-lógini gjørdi seg galdandi, var víst til at søkja forsorgarveiting.

Í høvuðsheitum bøta verandi sosialu skipanir um fíggjarligu fylgjurnar av sjúkuni. Tó kundi verið arbeitt fram ímóti eini serligari reglu fyri tey, sum eru leingi sjúk, men har útlit eru fyri, at tey kunnu koma í arbeiði aftur, so at neyðugt er ikki við eini uppsøgn. Eisini er tørvur á serligum reglum, soleiðis at avvarðandi kunnu vera um tann sjúka ella doyggjandi, eitt nú at vaksin børn kunnu vera um síni foreldur ella foreldur kunnu vera um síni vaksnu børn, t.v.s. tá ið børnini eru blivin 18 ár.

**Rørslutilboð:**

Fimleikafelagið Ljósið í Havn hevur saman við Krabbameinsfelagnum eitt fimleikalið, ið nevnist Firvaldar. Vant verður fríggjadag kl. 14.00 til 15.00 í fimleikarhøllini FIMI. Umstøðurnar eru sera góðar.

Tey seinastu árini hevur Krabbameinsfelagið havt fimleik í Pálshøll og í 2018 í Marghøllini í Vági:

Fimleikurin er fyri øll, sum hava, hava havt ella eru í viðgerð fyri krabbamein, og teirra avvarðandi.

Vit venja kondition, styrki og innaru ró. Útgangsstig verður tikið í hvat hvør einstakur megnar.

Øll, sum hava ella hava havt krabbamein og teirra avvarðandi eru vælkomin at luttaka. Dentur verður lagdur á venjingar, sum geva styrki og kondition.

Rørsla og styrkivenjing hava stóran týdning, bæði likamliga og sálarliga. Ítróttur og rørsla betra um útlitini fyri at fáa heilsuna aftur, samstundis, sum tað gevur styrki at standa ímóti hørðu viðgerðini.

# Krabbameinshagtøl

*Talan er um fyribils tøl, sum skulu takast við fyrivarni!*

## Krabbameinstilburðir í Føroyum árini 1995 – 2018




## Tilburðir av prostatakrabba




## Tilburðir av bróstkrabba



## Tilburðir av lungnakrabba




## Tilburðir av krabbameini í brisi




## Tilburðir av undirlívskrabba



## Tilburðir av krabba í maga og tarmi




| | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Krabbamein í spísirøri | 2 | 1 | 6 | 3 | 8 | 8 | 4 | 5 | 4 | 5 | 4 |
| Krabbamein í maga | 3 | 5 | 3 | 6 | 5 | 2 | 9 | 10 | 4 | 3 | 5 |
| Krabbamein í tjúkktarmi | 16 | 12 | 19 | 23 | 13 | 14 | 13 | 25 | 17 | 28 | 32 |
| Krabbamein í endatarmi | 11 | 11 | 11 | 8 | 8 | 14 | 12 | 12 | 10 | 8 | 14 |

## Tilburðir av húðkrabba




| | 1995 | 1996 | 1997 | 1998 | 1999 | 2000 | 2001 | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Móðurmerkjakrabbi | | 1 | | 2 | 1 | 2 | 2 | 5 | 4 | 7 | 17 | 10 | 6 | 8 | 2 | 7 | 6 | 6 | 3 | 1 | 3 | 9 | 8 | 5 |
| Húðkrabbi | 17 | 13 | 14 | 9 | 11 | 11 | 18 | 20 | 16 | 15 | 40 | 32 | 21 | 26 | 23 | 36 | 23 | 31 | 38 | 33 | 39 | 34 | 40 | 70 |




| | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Prostatakrabbi | 46 | 37 | 29 | 36 | 26 | 22 | 33 | 19 | 29 | 33 |
| Bróstkrabbi | 22 | 25 | 20 | 22 | 24 | 22 | 25 | 25 | 32 | 40 |
| Lungnakrabbi | 16 | 21 | 16 | 20 | 16 | 15 | 26 | 20 | 24 | 28 |
| Brisi | 8 | 9 | 6 | 12 | 8 | 5 | 8 | 6 | 12 | 6 |
| Lívmóðurhálskrabbi | 5 | 5 | 6 | 0 | 2 | 1 | 4 | 11 | 2 | 10 |
| Lívmóðurkrabbi | 14 | 7 | 4 | 6 | 4 | 3 | 3 | 6 | 3 | 9 |
| Vulvakrabbi | 1 | 0 | 3 | 1 | 0 | 1 | 2 | 0 | 0 | 1 |
| Eggrótakrabbi | 5 | 7 | 6 | 5 | 4 | 5 | 4 | 4 | 3 | 1 |
| Spísirørskrabbi | 1 | 6 | 3 | 8 | 8 | 4 | 5 | 4 | 5 | 4 |
| Magakrabba | 5 | 3 | 6 | 5 | 2 | 9 | 10 | 4 | 3 | 5 |
| Tjúkktarmskrabbi | 12 | 19 | 23 | 13 | 14 | 13 | 25 | 17 | 28 | 32 |
| Endatarmskrabbi | 11 | 11 | 8 | 8 | 14 | 12 | 12 | 10 | 8 | 14 |
| Móðurmerkjakrabbi | 2 | 7 | 6 | 6 | 3 | 1 | 3 | 9 | 8 | 5 |
| Húðkrabbi (vanligur) | 23 | 36 | 23 | 31 | 38 | 33 | 39 | 34 | 40 | 70 |
| Annar krabbi | 64 | 50 | 55 | 53 | 74 | 58 | 57 | 45 | 56 | 62 |
| Samanlagt | 235 | 243 | 214 | 226 | 237 | 204 | 256 | 214 | 253 | 320 |

Hagtøl

Kelda: Landssjúkrahúsið

Krabbameinsskráseting Føroya, Medisinski depilin.

*NORDCAN http://www-dep.iarc.fr/NORDCAN/DK/frame.asp*